VIÐMERKINGAR

# Ósakligar atfinningar

**Finnur Helmsdal**
*løgtingsmaður*



Formaðurin í Kvinnufelagnum, Bergtóra Hanusardóttir, segði við Útvarpið, at mannligir løgtingslimir ikki eru áhugaðir at viðgera spurningin um fosturtøku. Hon vísti á, at Annita á Fríðriksmørk hevði sett fyrispurning um fosturtøku í løgtinginum, og at bert tríggir menn høvdu tikið orðið í tí sambandinum. Allir tríggir, tí teir eru ímóti fosturtøkum. Tað er nú eina ferð siðvenja, at tá tingfólk seta fram munnligar fyrispurningar, so fara partamenn ikki kropp á kroppi um og yvirbjóða spyrjaran.

Annars viðgjørdu Bergtóra og Útvarpið eisini ætlanir landsstýrismansins, um at seta á stovn ráðgevingarbólk til kvinnur, sum eru við barn.

Kann upplýsa fyri Bergtóru Hanusardóttir, at tilmæli um slíkan ráðgevingarbólk varð sett fram í tinginum 1999, og vóru tað menn, sum tóku stig til hetta. Uppskotið varð endurtikið 2001, eisini av monnum. Sjálvur skrivaði eg grein í Dimmalætting í fjør um fosturtøkuspurningin, í hesi grein vísti eg á tað neyðuga í at hava slíkan ráðgevingarbólk.

Men tað tykist, sum hava útmeldingar frá **monnum** um slík viðurskifti als ongan áhuga. Hvørki Kvinnufeløg ella tíðindafólk leggja til merkis, um menn hava eina hugsan um slík virðir. Ikki uttan so, at hesar hugsanir eru "skeivar" so ella so.

Tað tykist, sum hava kvinnufeløg og tíðindafólk (lesið kanska kvinnulig tíðindafólk) bert áhuga fyri úttalilsi frá monnum um slík viðurskifti, um hesi bera á "skeiva" bógvin. Siga menn tað rætta um fosturtøku og annað, so eru teir als ikki áhugaverdir, als ikki til. Tað eru bara kvinnur, sum eru førar fyri at siga tey "røttu" tingini.

Tað er í fínasta lagi, at menn eru fyri atfinningum, og eg skilji eisini væl, at kvinnur fylkjast til tess at vinna munandi størri land. Men tað er sanniliga ikki í lagi, tá formaðurin í Kvinnufelganum sleingir slíkar ósakligar og beinleiðis skeivar atfinningar út um landið.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Nostalgisk harmaljóð

## -rennur føroyska málið upp á slokk - upp á sikt ?

**Regin Eikhólm**



Í Sosialinum 1. okt. 2004 hevur ein málsnillingur at landsstýrismanninum úr Kollafirði, fyri at landsstýrismaðurin í eini samrøðu við ein útvarpsmann hevur sagt "upp á sikt" tríggjar/fýra ferðir. Víst verður til seks navngivnar málsligar mansúrmælingar í Kollafirði: "Væl vóru teir mæltir, og ongantíð var neyðugt at siga 'ha', tá teir høvdu sagt tað, ið sigast skuldi." Aldur upp í slíkum umhvørvi átti landsstýrismaðurin at kent seg á málsligum heimabeiti og eigur at leggja sær hetta í geyma, skrivar kendi málsnillingur.

Vit fáa onki at vita um hvat landsstýrismaðurin segði, men bert at tað hann segði var ikki í tráð við siðbundnan málburð innan fordums eingjagarðar í Kollafirði. Mælt verður til at brúka "sum frá líður" heldur enn "upp á sikt". Annars heldur málsnillingurin lítið um málsliga førleikan hjá føroysku politikarunum yvirhøvur.

Tað kann undra, at ongin fordums vælmæltur kvennleggur úr Kollafirði er verdur at taka upp á tungu í hesum sambandi, men kanska er tað so, at vit í Føroyum als ikki hava nakað livandi móðurmál men bert eitt tekniskt mannamál? Stóra immigratiónin til USA vísti annars, at har menn fóru einsamallir avstað, var hópin truplari at varveita teirra uppruna mál og mentan, enn um kvinnur vóru við í ferðini.

**Hugflogs-ekvivalent virði**
Um nú landsstýrismaðurin meinti "upp á sikt", so er tað rætt í sjálvum sær, tí har var ongin tilvísing. Útsøgnin "sum frá líður" og útsøgnin "upp á sikt" hava ikki hugflogs-ekvivalent virði. Fyrra útsøgnin "sum frá líður" tekur støði í nú'inum og er ætlandi uttan at vera málsøkin, meðan seinna útsøgnin "upp á sikt" er málsøkin uttan at vera bundin at nú'inum, tvs. málið ið siktað verður eftir er at finni frammi í tíðarhorisontinum, og er á hóskandi abstraktiónsstøði hjá einum visionerum politikara, umframt at samtíðarfólk eisini skilja tað, ið landsstýrismaðurin sigur og meinar.

At sikta er vælkent føroyskt fyribrigdi. Siktið situr fremst á byrsumúlanum og er tað mann meddar við fyri at raka málið. At arbeiða "upp á sikt" er at líta fram í tíðarhorisontin og hava eina málrættaða ætlan uttan neyvari tíðarbinding.

**Abstraktiónsniveau**
Tað er ein sannroynd, at statiska bygdamálið hevur lægri abstraktiónsniveau enn dynamiska "ríkismálið". Hugsa vit okkum, at landsstýrismaðurin fylgdi áheitanini og málsliga helt seg til fordums heimabeitið, so var hetta eitt stig aftur eftir hali, tí unga ættarliðið byggir á herðarnar hjá undanfarna og ein maður, ið ikki er betri enn pápin, er verri. Einki stendur í stað!

Tey ið hava serligan áhuga fyri nostalgiskt bundnum máli kundu eins og í dansifeløgunum íðkað kvæðini, og har notið tað heldur kryptiska samskiftið, tá tikið verður til úr tí forna: "Hvokkin er hann Grímur á skóg ,..." (Viljorm Kornus kvæði ør. 49), ella "Tú skalt ikki Ásbjørn prúða jallin javnt við køttin leggja" (Brúsajøkuls kvæði ør. 68), bert fyri at nevna tvey dømir. Men her eins og við okkara orðatøkum og føstu vendingum er tað ein fyrimunur at kenna heildina fyri at skilja samanhangið, tvs. orðingin eigur at rætta seg eftir móttakarabólkinum og ikki umvent, sum vit annars eru so von við í Føroyum!

**Málførleiki**
Vit hava øll ein ávísan málførleika og tann einstaki sína idiolekt ella eginmálbúna. Málbúnin er ein samansett reflektión av uppvøkstri, evnum, útbúgving, starvi, áhuga, og temperamenti, ið skuldi kunna givið okkum ein móðurmálsligan samleika við stoltleika, kenslum og upplivingum. Tíverri endar hesin móðurmálsligi samleiki ofta fyri føroyingar, sum eitt slag av "málskizofrenum" upplivingum, tí móðurmálið (tosimálið) verður av ráðandi puristum óneyðuga nógv traðkað undir fót, og syndromini kenna vit alt ov væl. Ágangurin og eftirfylgjandi óvissan um móðurmálið hevur verið so stór, at nøkur siga seg ikki at duga føroyskt (móðurmálið) — eitt paradoks í sjálvum sær, meðan onnur leik sum lærd vaksin fólk eru so ósikkur, at tey javnan umbera seg við, at tey noyðast at brúka eitt "fremmandorð". Sum oftast eru hetta tó bert dagligt brúksorð ella hybridorð, sum puristarnir hava lýst í "bann". Men eins og undir inkvisitiónini ynskir fáur at mótmæla her, tí so ert tú antinationalur. Á henda hátt verður málslig happing nationalistiskt rættvísgjørd og er tíverri nógv úbreidd í Føroyum. Ja tað er nærmast vorðið til eina siðvenju at finnast at málforminum sjálvt hjá vaksnum fólki og so annars gloyma bæði innihald og endamál.

Størru málini hava fleiri 100.000 orð at velja ímillum, meðan okkara sagnorðsríka mál ikki røkkur teimum fyrstu 100.000. Í einum samskifti vil hetta geva okkum eitt reelt undirskot serliga av teimum meiri abstraktu altjóða orðunum, sum tí náturliga vilja koma yvir í okkara móðurmál í tann mun brúk er fyri teimum.

**Orðaval**
Eivind Weihe, málfrøðingur, upplýsir, at í dagligari talu brúka tey rímiliga mæltu um 2000 til 3000 ymisk orð, og at mong klára seg við minni enn 1000. W. Shakespeare (1564-16169) brúkti um 15.000 ymisk orð í sínum verkum.

Orðavalið hjá teimum gomlu var nøktandi til teirra heimabeiti, men vit kunnu ikki málsliga nostalgiskt beinskerja ungdómin, so hann ikki kann flúgva út um eingja-garðarnar. Nútíðarkrøvini til vælútbúna føroyingin í ábyrgdafullum starvið setir heilt onnur krøv til orðaval, abstraktiónsniveau og málsligan førleika annars. Globala samskiftið smittar málsliga av upp á okkum, og tað uttan mun til um lániorðið kemur úr Danmark ella Kina. Innlænt orð ella hugtøk verða snikkað til, so tey eisini við teirra hugflogsekvivalenta virði hóska til føroyska málið og harvið kunnu gerast virðiligir javningar, eins og innlænt blóð og mentan.

Tórur Jóansson, málfrøðingur, vísir í lærdu ritgerðini "English loanwords in Faroese", (Fannir 1997) á, at eitt samskifti hevur tað við at leggja orð eftir seg.

Vit hava góðar royndir við innlánum av øllum handan slagi: Átrúnaðin lántu vit úr Miðeystri, bókstavirnar úr latíni og tølini úr Arabia, sum framman-undan høvdu tey úr India o.s.fr.

Spurningurin er so, um orð og orðasamansetingar eftir akklimatisering ikki eiga at missa lániheitið, og gerast føroysk burturav, tí annars er allur heimurin upp á lán hjá hvørjum øðrum.

**Neyðug tillaging**
Í plantu- og djóraheiminum tosa vit um mutatiónir tá skjótar broytingar (tillagingar) henda í arvaeginleikunum. Føroyska málið hevur eisini tørv á tillagingum, men purisman í nostalgiskum hami hevur higartil í ov stóran mun darvað teimum neyðugu tillagingum til eitt tíðarhóskandi føroyskt brúksmál, og tí kunnu politikarar og onnur, sum fáast við annað enn "søguliga nútíð", viðhvørt hava eina kenslu av at vera í eini málsligari spennitroyggju, ið ikki gevur teirra samtíð neyðugt málsligt spælirúm, og tí verður kanska málið hareftir. Tó treyðugt so okkurt duga teir, tí tøgn kemur ikki inn á ting, søgdu teir gomlu!

Nútíðar ekstensialiski hugsunarhátturin við sínum funktionalistiska stíli brúkar breiðband, og tekur støðu út frá sær sjálvum. Hetta ger at málbúnin hjá tí einstaka umboðar ein skjótan, óbundnan og frælsari stíl, har málsliga referensuramman er flutt út um teir gomlu eingjagarðarnar og verður varisliga globaliserað. Málsliga klyvjarossið er at finna undir søguliga yvirlitinum.

Føroyska málið skal vera ein viðkomandi og frælsur samskiftismiðil fyri øll — leik sum lærd

Alt ov ofta er tað málformurin og ikki innihaldið, sum er til umrøðu í føroysku debattini, men innihaldið og ikki málformurin eigur at vera avgerandi, um vit ynskja at menna okkum á økinum. Aktiva føroyska málið skal vera ein viðkomandi og frælsur samskiftismiðil fyri øll, ið brúka málið, og ikki ein puristisk pyntidukka sum kvøður nostalgisk harmaljóð! Enn eru knotur í føroyskum kongum, og hóast ávaringar um málsligt fall so eru ongi tekin í sól og mána um, at føroyska málið upp á sikt - rennur upp á slokk.

# Apropos spælistað

## MARGARINFABRIKKIN
## Ein pedagogiskur stovnur undir Tórshavnar Kommunu

## ART EITT SLÓGBRÓTANDI
## Tónlista/mentanarligt eksperementarium í Tórshavnar Kommunu

HUGLEIÐINGAR
*Karl Anton Klein*
*Art leiðari, tónlistamaður*



*Karl Anton Klein*

### Margarinfabrikkin
Margarinfabrikkin byrjaði sum ein neyðloysn. Í byrjunar og mið nítiárunum, vóru trupuleikar við ungum fólkum sum gingu úti á gøtunum. Og summi av hesum gjørdu fortreð og herverk.

Hetta var sjálvandi eitt problem, bæði hjá politikkarum og lógregluni. Svarið upp á spurningin"Hvat skulu vit gera við tey ungu? "Var einfalt, seti tey inn í eitt gamalt hús sum frívillig og onnur vælmeinandi fólk vildu vera við til at umorganisera (summi av hesum fólkum komu frá einum avhaldsungmannafelag). Fyri at tað ikki skuldi vera lygn so slapp tað allmenna við at lata Barnabata "hjálpa" sær. Sigast kann at vælvildin mótvegis MF tey fyrstu árini hekk í einum klønum tráði. Men tað eyðnaðist Leivi og hansara fólki at "institutionalisera" MF áðrenn sitandi samgonga kom til.

Sambært Tórhalli Àslakkssyni (Leiðari nr 2 á MF.) var hansara jobb at ger seg sjálvan "unnveriligan", skilt á tann hátt at hetta skuldi vera eitt virkishús fyri børn og ung har brúkarin sjálvur ráddi fyri borgum.

Men 8 ár eru gingin og mangt er vent í holuni síðani. Einasti máti tað bær til at fáa Tórshavnar Kommunu til at taka við ábyrgdini av teimum ungu í kommununi, sum ikki vóru upptikin av til dømis ítrótti, varð, at broyta hetta demokratiska prinsippið, har tey ungu høvdu ávirkan á dagligdagin, til eina institutión, at líkna við ein barnagarð (barnagarðar eru ikki júst kendir fyri teirra útbreiddu fatan av demokratinum), við ongum ella næstan ongum sjálvsavgerðarrætti.

Og tað er enn ikki eyðnast at fáa foreldur og onnur vaksin at taka lut í tí arbeiði sum verður gjørt á MF. Spyrjast kann tí um tað er áhugin ella tíðin, ella hvat tað nú er sum, ger at foreldur ikki blanda seg uppí ella engagera seg í hvørjum umstøðum teirra børn og ung eru í.

Eg hvørki vil ella fari at taka dagar ímillum, um tað arbeiðið sum starvsfólkið á MF ger er nøktandi ella ikki. Eg takið bara støðu til teir ytru karmarnar sum eg síggji teir og havi sæð teir í tey 8 árini, eg havi verið her. Blandi meg ikki uppí tað pedagogiska arbeiðið. Tað hava vit jú fakfólk til.

Eg vil tó siga so mikið, at eg ynski at børn og ung, ikki bara í Havn men kring alt landið, skulu hava so góðar umstøður sum møguligt. Tí havi eg millum annað dedikera mína tíð til tess at skapa eitt livandi umhvørvi har trivnaður og skapandi andi er felagsnevnari fyri øllum virkseminum.

### ART. Eitt eksperimentarium í Tórshavnar Kommunu.
Sigast skal at samstarvið við Kommununa hevur verið og er gott og vit hava góðar sømdir,at skapa eitt livandi umhvørvi, har kreativiteturin er í hásæti. Og sum so at rokna tann kraftmiklasti depilin innan fyri Rokkin í Føroyum í dag. Hetta er einasta staðið sum bæði hevur venjingarhølir og vanliga skipar fyri tiltøkum, har ungu tónleikarnir sleppa á pall at royna seg. Hesar konsertir verða hildnar í samstarvi við MF. Og eru tær einar 10 -15 árliga, har nýggjur originalur rokkur er at hoyra.

Ungu rokktónleikarnir í Havn høvdu sama problem sum hini ungu sum gingu úti á gøtuni. Tí varð ART stovnað og endaði undir sama taki sum MF.

### Hvat hendir í ART ?
ART er ein felagskapur av áhugatónleikarum, nærri sagt áhugafelag rokktónleikaranna.

ART hevur 7 venjingarhølir har umleið 10 bólkar venja t.v.s. at einir 40 tónleikarar eru virknir í hølunum.

Á somu hædd, 2. hædd í MF er eisini tónleika-frálæra undir Tórshavnar Kvøld og Ungdómsskúla, har undirvíst verður í tónleiki í einar 40 timar um vikuna, har fólk bæði innan ART og uttanífrá fáa frálæru í tónleiki.

Her er ein tilvildarlig remsan av bólkum sum hava havt og hava samband við ART:

MOLD, HATESPEECH, FLUX, FLUFFY TOYS, SIDEEFFECT.ALL THAT RAIN, ÐIÐ, HAPPY, HTV, LÍTLA RÚM, TJÓGV, TOXIC, PARADOX, SPEAKER, MONKEY MONGOLIA, 48 PAGES, MAKREL, BLIZ, HEADACHE BLUES TREO, DIATRIBES, NIRVADA, ONKIKANNNDISKUTERAST.ALTKANN, THE HILLS, ZINK,PÁLL FINNUR PÁLL, JÓANES OG WILLIAM, JÁKUP ELI, SIC, THE STORY ENDS, LAM, LAMA SEA. DJ. SWITCH.

Sigast kann at ART hevur verið og er ein týðandi partur av øllum tí nýskapandi rokktónleikinum í Føroyum. Nevnast kunnu bólkar sum áðurnevndu Makrel, sum kappast uttanlands við góðum úrslitum. Gó Gó Blues sum ivaleyst eru besta boðið upp á blúsestónleik í Føroyum í dag. Vit útflyta góðar tónleikarar úr bæði Speaker og 48 Pages, sum fara niður til Danmarkar í Januar at nema sær betri kunnleika innan tónleik.Vit hava eisini havt bólkar sum Oblivion, MC Hár. Og 200 hava eisini vant her,

Krit sum var ein tann koolasti bólkurin innan tað slagið av heavy, sum teir spældu (suverænt teir bestu). ÐiÐ sum rulaði í Ålborg á størstu ungdómstónleikarstevnu í Europa (har vit saman við MF hava umboða Føroyar 3 ferðir, 4 ferð verður í januar 2005), og Eyðun sum saman við størstu punkdrotningini í Ìslandi, Heiðu, rokkaði Reykjavík totalt.

### Hvat er framtíðin ?
Hjá mær sum leiðara í ART og viðspælara í MF í næstan øll árini MF hevur verið til er lætt at koma til hesa niðurstøðu.

Tórshavnar Kommuna hevur (sambært Katrin Petersen,pedagogiskum leiðara) seinastu árini brúkt 100 milliónir kr. uppá at byggja 11 barnaansingarmiðstøðir (fyri ikki at kalla tað deplar) har ansað verður eftir børnum í nakrar tímar um døgnið. Restina av døgninum, kanska frá kl 18 til kl 07, standa hesir deplar tómir.

Hví ikki lata dyrnar upp fyri teimum ungu, so tey hava onkunstaðni í nærumhvørvinum at fara í frítíðini, ístaðin fyri at noyða tey oman í miðbýðin? Nógv foreldur í útjaðar-unum, (her hugsi eg ikki um Nólsoy, Hest ella Norðradal, men um Argir Norðasta Horn og Hoyvíksøkið) hvørki vilja ella tora lova børnum teirra oman í miðbýin á kvøldar/náttarrtíð. (hetta hevur ført við sær at foreldur hava tikið stig til at okkurt býlingshús er opið fyri ungum um kvøldið).

Um so var at hesir stovnar vóru opnir kundi kommunan sett nakrar pedagogar í starv afturat.

Eitt annað man kundi hugsað sær var, at nú Tórshavnar Kommuna er ígongd við stórar útbyggingar í Hoyvíkshaganum, hví so ikki byggja hóskiligar karmar í samband við nýgja skúlan, har børn og ung kunnu vera í frítíðini? Hví er tað ikki diskuterað? Hví ikki lova teimum at dansa og hava tað stuttligt í tryggum umstøðum í nærumhvørvi teirra?

Eg meini, tá man hevur brúkt yvir 100 milliónir (ikki júst smápening) uppá barnaansing og kanska aðrar 50-60 milliónir uppá ein eldrastovn. Hvussu ber tað so til at tað er so eiðsørt tá tað snýr seg um tey sum eru millum 7 og 18 ára gomul?

Ein og hvør sum er áhugaður í at síggja, hvaðar tey ungu leita sær leygarnátt/sunnumorgun, kunnu fara í Steinatún og vissa seg um, at mong av teimum heilt ungu ikki liggja heima og sova kl 04.

Okkara problem, t.v.s. tónleikaranna problem, er, at sum tað dag og dagliga verður sagt, vit hava onki stað. Men vit hava staðið, nevniliga húsið, sum verður kallað Margarinfabrikkin. Ein karmur sum øll, ið tíma at seta seg inn í tingini og tora at kalla ein spaka fyri ein spaka, tá tað snýr seg um at skapa nøktandi umstøður fyri børn og ung veit, ikki er egnaður og ikki livir upp til tey krøv bæði foreldur, polittikarar og samfelag annars, eiga at seta til eitt ungdómshús, nú vit ganga ímóti ár 3.000.

### Men húsið er perfekt til tónleikin.
Gev okkum MF til tónleikahús. Tað er vælegna til tess.

Eg veit at Kommunan arbeiðir við einari totalrenoveringsætlan av húsinum innanfyri eini 4-5 ár. Húsið er so mikið gamalt og krevur ábøtur. Um tað ikki verður gjørt, so kann tað javnast við jørðina, tí tað fer at kosta meira enn at byggja nýtt.

Loyvi okkum at bróta nakrar múrar niður inni, soleiðis at tað gerst eitt vælhóskandi spælistað. Tað krevst ikki so nógv og kostar heldur ikki tað stóra. Hetta hevði givið okkum eitt skotbrá har vit kundu uppbygt ein kapital, soleiðis at eitt framtíðar tónleikastað hevði borið seg sjálvt. So høvdu vit sloppið undan hesi patetisku biddaragongdini til eitt býráð, sum bert sær út til at duga at loysa eitt problem í senn.

Okkara loysn er bílig, kostar næstan onki. Út yvir hvat tað kostar at seta nakrar nýggjar pedagogar í starv.

Gevið børnunum og teimum ungu virðiligar umstøður. Gevið tónleikinum húsini og Havnin fær ein trivna sum tey flestu bara tora at droyma um.

Men loyvið skapandi kreftunum at virka til frama fyri einum sterkum vælfungerandi og fjølbroyttum mentanarlívi, soleiðis at ikki bara Havnaborgarar, men alt Føroya fólk kann vera erpi av okkara høvuðsstaði.